Fíggjarmálaráðið

Dagfesting:	05.05.2026
Mál nr.:	26/10007
Málsviðgjørt:	JEK
Ummælistíð:	13.05.-12.06.2026
Eftirkannað:	Lógartænastan dagfestir

Uppskot til

Kunngerð
um
útgjald av eftirlønarsamansparing hjá persóni, sum er fluttur av landinum

Við heimild í § 1, stk. 5 í løgtingslóg nr. 49 frá 14. mai 2013 um eftirløn, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 23 frá 26. februar 2026, verður ásett:

§ 1. Eftirlønarsamansparing hjá persóni, sum hevur uppihildið sær í Føroyum í í mesta lagi 60 mánaðar samanlagt, og sum er fluttur av landinum aftur, kann eftir umsókn rindast út aftur, hóast eftirlønarsamansparari ikki hevur nátt fólkapensjónsaldur.
Stk. 2. Umsókn um útgjald skal sendast TAKS.

§ 2. Útgjald av eftirlønarsamansparing eftir § 1 kann ikki fara fram, fyrr enn eftirlønarsamansparari hevur meldað flyting í fólkayvirlitinum.

§ 3. Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Kunngerð nr. 132 frá 10. desember 2013 um frítøku fyri at rinda eftirløn vegna tíðraavmarkað starv fer samstundis úr gildi.

Fíggjarmálaráðið, 5. mai 2026

Aksel V. Johannesen
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason